A                                        D              A
Mær man leingjast heim til føgru himlasalir,
             E                                     A
har mín frelsara um ævir eg skal sjá.
A                                         D                  A
Mær man leingjast burt sum bundin syndatrælur,
            E7                                          A
burt frá øllum óndum, sum her tyngja má.

                  D                                    A
         Bert í Jesu blóði kann eg frelsu finna,
                  E                                    A
         leiðin heim til himmals ber um Golgata.
          A7       D                                   A
         Kom í dag og lat nú Jesus á tær vinna,
                  E7                                      A
         og tú síggja skalt, at væl tað bar í lag.

2. Ljóð av klokkum verða út um heimin borin,
bera boð, at Jesus kemur aftur brátt.
Og um tú á jørð ein brúður hans er vorðin,
skal hann føra teg um føgru himnagátt.

3. Sæl tann løtan verður, tá vit skulu fata
alla pínu, alla líðing, sum hann bar,
hann, sum fyri okkum lívið vildi lata,
sum í øllum royndum Gudi lýðin var.

4. Kæra sál, sum knógvar undir syndabyrði,
kom til krossin, tú skalt kenna sálarró.
Tú mást biðja um, at Jesus er tín hirði,
og tú frelsu fáa skalt í Jesu blóð.

Okkum ókendur. Heri Tróndheim.
Lag: LM. 93. F-dur, c.